# Jólaframsýning í Listaglugganum



*Á framsýningini er ein littekning av løgtingsmanninum Tórbjørn Jacobsen, sum Olivar við Neyst hevur teknað*



*Listagluggin er karmur um eina fjølbroytta framsýning við málningum og skulpturum*

**Mikudagin 12. desember letur upp ein framsýning í Listaglugganum í Niels Finsensgøtu í Havn**

FRAMSÝNING

Ein nýggj framsýning letur upp mikudagin kl. 16 í Listaglugganum í Niels Finsesgøtu 25. Á framsýningini verða sýndar fram umleið 35 málningar, umframt vatnlitsmyndir og skulpturar.

Við á framsýningini eru Andreas Andreassen, Amariel Norðoy, Bárður Jákupsson, Ingi Jacobsen, Eyðun av Reyni, Kári Svensson, Olivar við Neyst og Tórbjørn Olsen.

Nærum øll verkini, sum eru við á framsýningini, eru málað og virkað til í 2007.

Andreas sýnir framskulpturar, har kvinnan og hundurin eru inspiratión til tey framsýndu verkini. Landslagið og báturin eru høvuðsættirninr í myndunum hjá Amariel. Bárður er umboðaður á framsýningini við listaverkum í sínum serliga og vælkenda stíli - myndirnar eru abstrakter í einum serligum koloristiskum hami - tó soleiðis at tú í onkrari mynd sær eyðkenda landslagið.

Myndirnar hjá Eyðun og Tórbørn hava sín eyðkenda stíl, har eygleiðarin merkir teirra støðufesti í myndevninum. Verkini hjá Inga eru í høvuðsheitum koloristisk í sínum bygnaði.

Kári hevur funnið sína egnu legu og merkir tú, at hann støðugt er á leiðini í uppbyggjan av sínum myndevni og formgeving. Olivar er umboðaður við sínum vælkendu koloristisku myndum, har myndevnini er náttúra og fólk. Eisini hevur Olivar fleiri vatnlitsmyndir við á framsýningini.

Framsýningin er opin mán - frí 14.00 - 17.30 og ley 11.00 - 14.00.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hans J. Reinert Tórshavn**, andaðist á Láargarði sunnudagin, 92 ára gamal. Bønarhald verður á Lágargarði týskvøldið kl. 18.00 Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin kl. 13.00. Tey, ið vilja minnast Hans, kunna lata eina gávu til Lágargarð á konto í peningastovnunum.

**Bjarma Niclaesen av Velbastað** andaðist í heiminum sunnudagin, 77 ára gomul. Jarðarferðin verður hósdagin klokkan 12 úr Kirkjubøðar Kirkja.

**Dagurin**
**12. desember. Eqimachus**, deyður umleið ár 250. Kristin maður í Aleksandriu, sum varð tikin av døgum, tá ið Decius keisari rádd

# Føroya Banki nú eisini við MasterCard

**Eftir at Eik fyri stuttum kom á marknaðin við nýggju e-korti, bjóðar Føroya Banki nú eisini MasterCard til sínar kundar**

HANDIL
*Tíðindaskriv*

MasterCard er eitt altjóða kredittkort, sum kann brúkast um allan heim. MasterCard er væl egnað til teirra, sum ferðast nógv og hava stórar ferða- og umboðsútreiðslur. Eisini kann kortið nýtast í Føroyum og gevur tær ein kreditt, sum tú ikki fært við t.d. FR/VISA. MasterCard kann nýtast at gjalda við á hotellum, matstøðum, bensinstøðum og aðrastaðni. Reiður peningur kann takast út í sjálvtøkum og peningastovnum í Føroyum og úti í heimi.

Bankin hevur fýra ymisk sløg av MasterCard at bjóða kundum sínum. Standard, har kreditt-hámarkið er 30.000 kr. Somuleiðis er nýtsluhámarkið 30.000 kr. Tú kanst taka upp til 3.000 kr. út um dagin í sjálvtøkum, men ikki meira enn 15.000 kr. um mánaðin. Eisini hevur Standard-kortið eina ferðatrygging, sum umfatar kortánaran.

Gullkortið hevur eitt kreditt- og nýtsluhámark á 50.000 kr. Tú kanst taka 6.000 kr. út um dagin í sjálvtøkum, tó í mesta lagi 30.000 kr. um mánaðin. Eisini hevur Gull-kortið eina ferðatrygging, sum umfatar kortánaran við familju umframt hópin av øðrum tryggingum.

Platinkortið geuvr eitt kreditt- og nýtsluhámark upp í 250.000 kr. Tú kanst taka upp í 10.000 kr. út um dagin í sjálvtøkum, tó í mesta lagi 50.000 kr. um mánaðin. Eisini hevur Platin-kortið eina ferðatrygging, sum umfatar kortánaran við familju umframt hópin av øðrum tryggingum.

Og at enda er talan um sonevnt Business og Familjukort. Hetta kortið er ætlað sum útreiðslukort til stórar og smáar fyritøkur. Business-kortið fæst eisini í Standard, Gull og Platin. Hevur tú longu eitt av vanligu MasterCard-kortunum, kanst tú fáa eitt Mastercard-Familjukort til makan.